# Bilar

Nr. 231 • hósdagur • 2. desember 2004 • 78. árg.



*Innan er A3 sportsligur við sportsetrum og alu-look luftdysum á instrumentborðinum*

# Sportsligur Audi A3 Sportback

**Audi A3 Sportback er annað enn ein stationcar við 5 hurðum. Bilurin er væl gjørdur og sportsligur við koyrieginleikum í serklassa, og 2,0 litur FSI motorurin við 150 hk er kvikur og hóskar væl til bilin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Audi A3 Sportback er stationcar útgávan av Audi A3 við størri viðførisrúmi og betri beinplássi til tey ferðandi á baksetrinum. Bilurin kappast heldur í gjøgnumførdum kvaliteti enn í prísi við aðrar bilar í somu støðd.

Undirvognurin er soleiðis gjørdur, at bilurin hevur sportligar koyrieginleikar og sera góðan stabilitet í svingum. Elektromekanisku róðurgreiðirnar og servostýringin laga seg alla tíðina til ferðina.

Innan er A3 sportligur við sportsetrum og alu-look luftdysum á instrumentborðinum og eini smartari og praktiskari gardanboks.

A3 Sportback fæst við fýra bensinmotorum og tveimum diesel. Bensinmotorarnir eru: 1,6 litur við 102 hk, 2,0 litur FSI við 150 hk, 2,0 litur við 200 hk og turbo, og 3,2 litur V6 við 250 hk og Quattro. Dieselmotorarnir eru: 1,9 TDI við 105 hk, og 2,0 TDI við 140 hk. Nakrar av útgávunum hava 6-trins girkassa sum standard.

A3 Sportback fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur, grundútgávan er Attraction, sportútgávan er Ambition og Ambiente er luksusútgávan.

Av trygdarútgerð kunnu vit nevna t.d. aktivar nakkapútur, airbag framman, í síðunum og høvuðairbag til tey ferðandi framman og aftan.

Bilurin vit royndarkoyrdu var ein 2,0 FSI Attraction við 6 girum, sum eigur at kosta kr. 296.000, men við blankum takboylum og klimaanleggi kostar hann kr. 315.000.

17" hjólini á bilinum kosta kr. 8.000 eyka.

Annars kostar bíligasti A3 Sportback kr. 258.000.




*Audi A3 Sportback. Eins og allir nýggir Audi hevur hesin eisini nýggja trapez-formaða kølaragittari*




*A3 sportback hevur stóra baklúku, og lessihæddin er lág*




*Audi A3 Sportback er stationcar útgávan av Audi A3*

Audi

## Audi A3 2,0 Attraction Sportback

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,0 litur 4 syl. FSI besnin 120 hk |
| 0-100 km/t: | 9,1 sek. |
| Bensinnýtsla: | 13,5 - 14,5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 225/45-17 (standard = 205/55-16) |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 428,6 cm |
| Breidd: | 176,5 cm |
| Hædd: | 142,3 cm |
| Eginvekt: | 1205 kg |
| Viðførisrúm: | 302 litrar |
| Prísur: | kr. 315.000,- |
| Søluumboð | Bilasølan v. Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 315354<br>www.bilasolan.fo |